# Ráðstevna um musikkskúlar

**Føroya Musikklærarafelag og Sanglærarafelag Føroya, skipa fríggjadagin 22. oktober og leygardagin 23. oktober fyri áhugaverdari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*



*Stór ráðstevna um musikkskúlar verður nú hildin í Norðurlandahúsinum*

Ráðstevnan lýsir m.a. musikkskúlaskipanir í Noregi, Íslandi, Danmark og Føroyum.

Á ráðstevnuni hava fyrireikararnir bjóðað 5 dugnaligum fyrilestrahaldarum úr norðurlondum at halda fyrilestrar. Hesir hava allir drúgvar royndir innan ymisk tónleikaøkir.

### Hví Ráðstevna

Tað eru 20 ár síðani verandi musikkskúlaskipan bleiv gjørd, og er einki »komma« broytt hesi árini.

Tað er meira og meira sjónligt, at tíðin, í ávísum førum, er farin frá verandi skipan, sum t.d. ikki tekur hædd fyri undirvísingini hjá framkomnum næmingum.

Musikklærarafelagið vil við hesum fáa gongd á kjakið um, hvussu ein á besta hátt kann tillaga eina nýggja skipan til dagsins veruleika.

Ynski hjá lærarum hevur í langa tíð verið at fáa eina samansetta starvssetan, har tað ber til, bæði at vera lærari og tónleikari. Ein av fyrilestrahaldarunum er Erik Bugge úr Noregi. Fyrilestur hansara snýr seg m.a. um, hvussu samansettar starvssetanir virka í Norland Fylke.

Ein annar fyrilestrahaldari er Tormod Bjørnestad úr Noregi. Hesin hevur drúgvar royndir í, hvussu til ber at betra og økja um samstarvi millum Fólkaskúlan og Musikkskúlan.

### Áheitan á politiska myndugleikan!

Ráðstevnan miðjar eisini eftir, at fáa á tal politiska myndugleikan, sum á ymiskan hátt umsita sang- og tónleikaundirvísing í Føroyum.

Tí verða musikkskúlaleiðarar, umboð fyri kommunupolitikkarar, Mentanarnevnd Løgtingsins og §7 nevndin fyri Musikkskúlaskipan Føroya bodnir at luttaka.

Fyrireikararnir vóna, at ráðstevnan vil virka fyri at fólk, ið varða av musikkskúlaskipanini, eisini vilja ogna sær størri fakligt innlit í, hvussu slíkar skipanir virka í øðrum londum.

### Skrá fyri Ráðstevnuna

**Fríggjadagin 22. oktober**

| | |
|---|---|
| 09:00 - 09:30 | **Skráseting** |
| 09:30 - 10:00 | **Ráðstevnan** verður sett av Jógvani á Lakjuni, Mentamálaráðharra |
| 10:00 - 10:30 | **Fyrilestur** Erik Bagge NO, Samansett størv (a. Tónleikari/lærari, b. Fólkaskúlin, Musikkskúlin, Studentaskúlin) |
| 10:30 - 11:15 | **Kjak** |
| 11:15 - 11:30 | **Kaffi** |
| 11:30 - 12:00 | **Fyrilestur** Svend Aaquist DK , Nútímanstónleikur i undirvísingini |
| 12:00 - 12:45 | **Kjak** |
| 12:45 - 14:00 | **Ábit** |
| 14:00 - 14:15 | **Tónleikur** |
| 14:15 - 14:45 | **Fyrilestur** Peter O. Petersen FO, Sangurin í føroyska Fólkaskúlanum i |
| 14:45 - 15:30 | **Kjak** |
| 15:30 - 16:00 | **Fyrilestur** Tormod Bjørnestad NO, samstarv millum Fólkaskúlan og Mentanarskúlan |
| 16:00 - 16:45 | **Kjak** |

Leygardagur 23. oktober

| | |
|---|---|
| 09:45 - 10:00 | **Tónleikur** |
| 10.00 - 10:30 | **Fyrilestur** Bjørn Árnason ÍS, fakfelagsarbeiði í fusikkskúlahøpi |
| 10.30 - 11:15 | **Kjak** |
| 11.15 - 11:30 | **Kaffi** |
| 11:30 - 12:00 | **Fyrilestur** Martin Mouritsen FO, Føroya Musikkskúli í 20 ár. |
| 12:00 - 12:45 | **Kjak** |
| 12:45 - 14:00 | **Ábit** |
| 14:00 - 15:00 | **Orðaskifti** |
| 15:00 - 15:30 | Kaffi |
| 16:00 - 17:00 | **Konsert** við kórinum Tarira |

# Heimamissiónin serligt tiltak í Vági

**Tað var í Vági, at Heimamissiónin byrjaði sítt virksemi fyri 100 árum síðani. Tí verður skipað fyri serligum tiltøkum har vikuskiftið 5. - 7. november**

MØTI

Í sambandi við, at í ár eru 100 ár liðin, síðani Heimamissiónin byrjaði sítt virksemi í Føroyum undir skipaðum viðurskiftum, verður hildið eitt serstakt tiltak suðuri í Vági vikuskiftið 5 - 7. nov. Tað var í Vági, Heimamissiónin byrjaði sítt virksemi, og er tað orsøkin til, at hetta tiltak verður lagt har.

Á skránni verða møti fríggjakvøld og leygarkvøld kl. 20 og sunnukvøld kl. 18. Og verða tey øll í Meinigheitshúsinum í Vági. Leygardagin kl. 16 seinrapartin verður eitt serligt barnatiltak fyri alla oynna, sum barnaráðgevin skipar fyri. Leygarkvøldið kl. 22 verður eitt serligt ungdómstiltak, sum ungdómsráðgevin stendur fyri.

Sunnudagin er gudstænasta við altargongd, og eftir gudstænastuna er festdøgurði, sum Heimamissiónin bjóðar øllum við til. Hann verður í VB-húsinum, og vegna avmarkað pláss er neyðugt at siga frá í seinasta lagi 30. okt. Lýsing um tað stendur í bløðunum 21. og 22. okt.

Talarar á møtunum verða trúboðararnir hjá Heimamissiónini, og sangkreftir vera bæði norðanfjørðs og úr Suðuroynni.

# Appilsingentan aftur at fáa

**Appilsingentan eftir Jostein Gaarder, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út um ólavsøkumundið, varð útseld eftir stuttari tíð. Nú er hon uppafturprentað**

BØKUR
*Tíðindaskriv*

Eisini í Føroyum hevur Appilsingentan fingið sera góða móttøku. Bókin, sum kom út á 22 málum í senn í fjør, er fyrsta ungdómsskaldsøgan eftir Jostein Gaarder í tíggju ár. Ummælini í heimlandinum hjá Gaarder Noregi hava verið sera góð: "Ungdómsbók, ið djarvt nemur við stórar spurningar - lívið og deyðan," skrivaði Dagbladet millum annað. Og Aftenposten skrivaði, at "henda bókin fangar bæði yngri og eldri lesarar við hugtakandi frásøgustíli sínum. Ein spennandi og samstundis sorgblíð søga". Á Listastevnuni í summar tosaði Jostein Gaarder um skaldskap sín og høvundavirki; ivaleyst hevur hetta tiltakið virkað við til, at bókin er so væl móttikin í Føroyum.

Appilsingentan snýr seg um Georg, sum er fimtan ára gamal. Hann er sum aðrir stórir dreingir, men so ein dagin fær hann eitt bræv, sum pápin hevur skrivað til hansara, beint áðrenn hann doyði. Í brævinum skrivar hann um leitanina eftir tí gátuføru Appilsingentuni, ein duldarfull vera, ið hann hittir tey mest óvæntaðu støðini.

Appilsingentan er ein heit, veruleikakend og bergtakandi søga um at liva, elska og doyggja - ein nýggj hugvekjandi søga, sum væl tolir at verða sett undir liðina á øllum teimum virðisløntu bókunum hjá høvdundanum. Aðrar bøkur eftir Jostein Gaarder, ið eru komnar út á føroyskum eru: Kabalgátan, Jólagátan, Sum í spegli, sum í gátu, og Heimurin hjá Suffíu, ið kom út samstundis sum Appilsingentan. Laura Joensen hevur týtt allar til føroyskt uttan Heimin hjá Suffíu, ið Edvard Olsen hevur týtt.



# Eysturoyingar súltaðir í 10 ár

**Nú eru heili 10 ár síðani, at runavíkingar søktu landsstýrið um loyvi at gera fríhavn. Enn er onki svar komið. Men nú havnarmenn gera vart við seg, lovar landsstýrið at avgreiða málið upp á eina viku**

DRÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í 10 ár er ein umsókn frá Runavík um fríhavn súltað í Landsstýrinum. men nú havnarmenn vilja hava fríhavn á Sundi, lovar landsstýrið at avgreiða málið upp á eina viku*

Stendur tað til eysturoyingar, verður landsstýrið dømt fyri drál.

Tað eru nú heili 10 ár síðani at runavíkingar søktu landsstýrið um loyvi at gera Runavíkar Havn til fríhavn. Enn er onki svar komið.

Men tá ið havnarmenn gjørdu vart við seg í farnu viku, lovar landsstýrið at avgreiða málið upp á eina viku!

Hetta fær eisini runavíkingar at spyrja, um tað er so livandi galið, at landsstýrið ger mannamun á føroyingum.

### Bjarni svara fyri seg

Í Runavík meta tey málið so álvarsligt, at Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, fer at reisa málið á Føroya Løgtingi í dag.

Tá ið tingfundur verður seinnapartin í fag, fer hann at seta landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, ein fyrispurning um fríhavn í Føroyum.

Kári P. Højgaard sigur, at nú um dagarnar kom fram at russisk skip vilja hava eina fríhavn í Føroyum.

– Tað varð eisini ført fram, at russarar vilja hava, at fríhavnin skal vera á Sundi.

– Tað kom týðiliga til sjóndar, at hetta er eitt mál, sum hevur skund og at allar árar skuldu leggjast í sjógv fyri at avgreiða málið her og nú, tí Bjarni Djurholm trein sjálvur fram á sjónvarpsskíggjan og boðaði frá, at hetta mál skuldi fáa eina heilt óvanliga skjóta viðgerð.

– Skilti eg boðskapin frá landsstýrismanninum rætt, skuldu formligu loyvini fáast upp á pláss, so havnalagið á Sundi kundi verða góðkent sum fríhavn áðrenn ein vika var farin, sigur Kári Djurholm.

Hann sigur, at heldur tað vera sjálvsagt, at allar føroyskar kommunur fáa somu skjótu og góðu viðgerð, sum Tórshavnar Kommuna og at svar uppá umsóknir og fyrispurningar verða avgreiddar sambært galdandi fyrisitingarreglum.

Tí vil hann í fyrsta lagi hava greiði á, hvør tað er í landsstýrinum, sum umsitur hetta málsøki og hann vil eisini hava at vita um málið um fríhavn á Sundi er avgreidd.

Hann vil eisini hava at vita, um tað er eitt skipafelag, eitt eitt reiðarí ella um tað er Tórshavnar Kommuna, sum hevur søkt um at fáa Sund til fríhavn.

Somuleiðis vil Kári P. Højgaard hava at vita um lógararbeiðið um fríhavnir liðugt.

At enda vil hann hava at vita, um aðrar kommuna hava umsóknir liggjandi í landsstýrinum um fríhavn.

Og um so er, vil hann eisini hava at vita, hvussu nógvar kommunur talan er um og um tær hava fingið svar frá landsstýrinum soleiðis at umsóknir teirra mugu metast at vera avgreiddar.

### Heilt burturvið

Kári Højgaard heldur, at arbeiðslagið hjá landsstýrinum er heilt burturvið.

Hann situr sjálvur í Runavíkar Býráð, har hann hevur verið formaður í havnarnevndini øll árini.

– Tað seinasta,vit frættu frá landsstýrinum um umsókn okkara umfríhavn í Runavík, var í 2000, tá ið Vinnumálaráðið boðar frá, at talan er um eitt málsøki, ið hoyrir undir fíggjarmálaráðið og at umsókn okkara, er send hagar til avgreiðslu.

Síðani hava vit hvørki hoyrt orð ella eið aftur úr landsstýrinum. Men tá var Bjarni Djurholm eisini landsstýrismaður í vinnumálum.

– Tí tykir tað mær tvífalt løgið, at at hann nú lovar at avgreiða eitt mál, sum hann kanska onki hevur við at gera, upp á eina viku, sigur Kári P. Højgaard.

## Gongdin í málinum um fríhavn í Runavík

**Tað eru nú 10 ár síðani, at Runavíkar Býráð søkti landsstýrið um loyvi at gera Runavík til Fríhavn. Kári P. Højgaard, formaður í havnanevndini, sigur, at gongdin í málinum hevur verið hendan**

**4. oktober í 1994:** Runavíkar Kommuna søkir landsstýrið um loyvi at gera Runavíkar Havn til fríhavn. Kommunan vísir á, at havnin er útgjørd til at nøkta tørvin bæði til fiskivinnu og farmavinnu og at havnin er ein av teimum størstu í landinum.
**8. mars 2005:** Dagur og Vika fortelja at tríggjar kommunur hava søkt landsstýrið um loyvi at gera fríhavn. Talan eru um Tórshavnar Kommunu, Sjóvar kommunu og Tvøroyrar kommunu.
**9. mars 2005:** Borgarstjórin í Runavík skrivar landsstýrinum bræv og minnir á umsóknina frá Runavíkar Kommunu frá 1994.
**22. apríl 1995:** Landsstýrið svarar at ongin lóg er gjørd um fríhavnir, men at landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at gera álit um fríhavnir og at arbeiðsbólkurin er liðugur. Samstundis hevur landsstýrið á fundi 7. mars 2005 samtykt at gera neyðuga lógararbeiði og at landsstýrið skal venda aftur til málið.
**28. juni 1999:** Borgarstjórin í Runavík skrivar landsstýrinum bræv, har hann enn einaferð minnir á umsóknina frá Runavíkar Kommunu. Hetta brævið er sent vinnumálaráðið.
**3. februar 2000:** Borgarstjórin í Runavík skrivar landsstýrinum aftur landsstýrinum bræv, har hann enn einaferð minnir á umsóknina frá Runavíkar Kommunu. Borgarstjórin heldur, at Runavíkar Kommuna hevur krav uppá eitt svar frá landsstýrinum upp á umsóknina. Eisini hetta brævið er sent vinnumálaráðnum.
**8. Februar 2000:** Vinnumálaráðið boðar frá, at tað er fíggjarmálaráðið, sum umsitur málsøkið og at umsóknin frá Runavíkar Býráð er send hagar til avgreiðslu.

Síðani hevur kommunan hvørki hoyrt orð ella eið aftur úr landsstýrinum.

# Styrkja seg kring alt landið

**Nú ætlanin er at útbyggja psykiatrisku viðgerðina kring landið, fer Sinnisbati nú at stovna lokalfeløg kring alt landið. Fyrsta felagið verður stovnað á almennum fundi í Suðuroy í kvøld**

SINNISBATI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Nú fer felagið Sinnisbati at styrkja seg kring alt landið. Sinnisbati er felagið hjá teimum sálarliga sjúku og í royndunum at menna felagið, er ætlanin nú at stovna lokalfeløg kring alt landið.

Og tað fyrsta lokalfelagið hjá Sinnisbataverður stovna í Suðuroynni í kvøld.

Í hesum sambandi verður skipað fyri almennum hugnakvøldið á Hotellinum í Øravík í kvøld klokkan 19.30, har øll eru vælkomin.

Lokalfeløgini skulu røkja sambandið við limirnar í lokaløkinum og felagið skal eisini skipa fyri fundum fyri at kunna fólkið, kommunustýrislimir og onnur um, hvat rørist á økinum og um, hvørjar ætlanir eru.

Ætlanin er at fimm fólk skulu manna nevndina í lokalfelagnum.

Á fundinum fer forkvinnan í Sinnisbata, Soffi Egholm, at greiða frá arbeiðnum hjá Sinnisbata nú, og framyvir.

Eitt umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið fer at greiða frá um framtíðarætlanir innan psykiatri. Eisini fer Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba at tosa um evnið: Menniskjað í miðdeplinum.

Tróndur Enni fer at kryddað kvøldið við sangi og tónleiki.

Tað var á aðalfundinum fyrst í ár, at Sinnisbati avgjørdi at stovnalokalfeløg kring landið.

– Síðani tá hava vit bíðað eftir at vita, hvørjar ætlanir, landsstýrið hevur á økinum, sigur Soffi Egholm.

Og hon fegnast um, at landsstýrið hevur raðfest økið rættiliga ovarliga og hevur arbeitt skjótt við at leggja eina ætlan fyri psykiatriini um alt landið.

Hon sigur eisini, at hon er ógvuliga fegin um ætlanina hjá landsstýrinum, tí tað er ein sera góð ætlan eftir hennara tykki.